LM-117/2023

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Fylgiskjal 4

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
FO-100 Tórshavn

Tórshavn, 21. apríl 2024

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um tøkugjald

Fróðskaparsetur Føroya takkar aðalráðnum fyri høvi at koma við hoyringarsvari til uppskotið til løgtingslóg um tøkugjald.

Setrið bað búskaparfrøðingarnar á Søgu- og samfelagsdeildini um at orða hoyringarsvar, og vit hava fingið tvey skriv, sum eru sett inn niðanfyri í hetta skjalið. Fyrra skrivið er frá Hans Ellefsen, lektara, og tað seinna frá Zvonko Mrdalo, adjunkti (hetta seinna er á enskum).

Umframt hoyringarskrivini niðanfyri, vilja vit yvirskipað viðmerkja § 4, har tað stendur:

"§ 4. 2% av tøkugjaldinum fella til kommunurnar.
Stk. 2. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur nærri reglur um, hvussu inntøkan verður býtt millum kommunurnar og um útgjald."

Vit fegnast um, at í viðmerkingunum til § 4 stendur:

"Harumframt er ætlanin, at 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum fer til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum. Endamálið er at stuðla upp undir granskingarvirksemið á aliøkinum í breiðari merking."

Tað er sera kærkomið, at ætlan er um at seta 1% av inntøkunum frá tøkugjaldinum til at raðfesta gransking til frama fyri aling í Føroyum, men Setrið vil staðiliga mæla til, at hetta verður sett inn í sjálva lógina (eins og tað er tilskilað viðvíkjandi kommunumum).

Vegna Fróðskaparsetur Føroya
Johan Ísak Suni Hansen, fyrisitingarstjóri

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Hoyringarskriv frá Hans Ellefsen, lektara:

Samanumtikið verður mett, at uppskotið er sera fløkt og ringt er at gjøgnumskoða, hvat avleiðingin av tí verður. Mælt verður til at bíða við at seta hetta uppskotið í verk fyrrenn tað er greina víðari um tað ikki kundi veri ein annan háttur, at kravt inn tilfeingisrentuna enn hesin hátturin, sum lógaruppskotið leggur upp til.

Alifeløgini í Føroyum hava fingið loyvi til at brúka teir føroysku firðirnar til sítt alivirksemi. Føroya fólk eigur firðirnar og tí eiga hesi feløgini at rinda landinum leigukostnað fyri tað, eins og allar aðrar fyritøkur gera av sínum virksemi um tey brúka økið hjá øðrum. Stóri spurningurin, sum ikki verður svaraður í lógaruppskotinum, er, hvat tann rætti prísurin fyri aliloyvini er. Tað verður bert sagt, at tað skal vera 'eitt rímiligt og rættvíst gjald'. Niðanfyri er ein roynd at svara spurninginum, um hetta gjaldið, sum nú ætlandi verður kravt er rímiligt og rættvíst. Eisini verður komið inn á alternativ uppskot til at taka tilfeingisrentuna inn enn hetta uppskotið og eitt sindur um smálutirnar í uppskotinum.

Framleiðslu faktorar og tilfeingisrentan

Fyri alt privat búskaparligt virksemi eru tríggir framleiðslufaktorar:

- Kapitalur
- Arbeiði
- Náttúrutilfeingi

Búskaparfrøðin sigur, at allir framleiðslufaktorar skulu rindast fyri. Verður hetta ikki gjørt, kunnu framleiðarar (yvir)brúka hendan framleiðslufaktorin. Um framleiðarar fáa ein ella fleiri av teirra framleiðslufaktorum (arbeiðsmegi, kapital ella náttúrutilfeingi) ov bíliga ella ókeypis, so vilja teir nýta ov nógv av tí. Eitt atlit sum ofta verður brúkt sum dømi er atlitið, at um tað er ókeypis at dálka náttúruna, vilja framleiðarar dálka náttúruna ov nógv ella um arbeiðsmegin er ov bílig, vilja framleiðarar nýta ov nógv av henni. Um feløg gjalda rættan prís fyri hvønn framleiðslufaktor, vil hvørt felag verða effektivt og samfelagið sum heild verða effektivt. Vit siga, at samfelagið fær mest burturúr, tá framleiðarar eru effektivir.

Eisini sigur búskaparfrøðin, at um vit taka tilfeingisrentuna inn, vil hetta ikki skeikla virksemið hjá vinnuni, tí hetta er eyka vinningur í mun til tað normala. Somuleiðis kann hendan tilfeingisrentan, um hon verður tikin inn, minka um

inntøkuskattin fyri vanliga fólkið ella minka um haldførisavbjóðingina hjá føroyska samfelagnum.

Hvør av hesum framleiðslufaktorum eigur sum sagt at fáa sítt marknaðar grundaða avkast. Tann framleiðslufaktorurin, sum eitur 'kapitalur' skal fáa rentur og yvirskot t.v.s. tey sum seta pening í felagið skulu hava eitt kappingarført avkast av síni íløgu og tey, sum læna pengar til virksemið, skulu hava eina rentu, sum er marknaðargrundað. Næsta punktið 'arbeiði' eru fólkini, sum arbeiða í alifeløgum, sum skulu hava sína kappingarføru løn, sum er grundað á samráðingar millum arbeiðsfólkið og arbeiðsgevaran. Til seinast er tað 'náttúrutilfeingi', sum eisini skal hava sítt marknaðargrundaða avkast. Hetta er tann ringari parturin, tí hvat skal hetta gjaldið verða? Vit hava ongan marknað har til ber at áseta hetta gjaldið. Tú kundi gjørt eina uppboðssølu til tess at finna tann marknaðarprísin, men tað er neyvan realistiskt í Føroyum. Tú hevur roynt tað í Noregi við góðum úrslitið, men tað er bert fyri nýggj loyvir.

Tað, sum náttúrutilfeingi átti at fingið, er tað vit vanliga kalla tilfeingisrentuna. Vit kunnu gera útrokningar av, hvat hendan tilfeingisrentan er. Hetta verður her gjørt við at hyggja at, hvat kapitalurin hevur fingið og sagt, at um hann fekk 6%, so er tað, sum er yvir tað yvirnormalt yvirskot (ella tilfeingisrenta). Arbeiðsmegin í aling verður her søgd at fáa tað marknaðargrundaðu lønina í dag og tí ikki nakra eyka løn í mun til restina av búskapinum. Sostatt er tað ein útrokning av, hvat framleiðslufaktorarnir 'Kapitalur' og 'Arbeiði' eiga at fáa og tað sum tá er eftir, er tað 'Náttúrutilfeingi' eigur at fáa.

Útgangsstøðið fyri tølunum niðanfyri er hagtalsgrunnurin hjá Hagstovuni, har vit hyggja at roknskapunum hjá vinnugreinini 'aling á sjónum'. Hetta er samlaði roknskapurin hjá alifeløgunum, te. tann parturin av virkseminum, sum er á sjónum sambært Hagstovuni. Sostatt er tað ikki virksemi, sum er á landið ella nakað virksemi, sum er eftir, at laksurin er tikin upp úr sjónum. Útrokningin av tilfeingisrentuni er yvirskotið av virkseminum minus eitt normal avkast av materiellu støðisognini. Hendan støðisognin er ikki tað sama sum eginpeningurin, tí her er eisini láni peningur, sum skal rentast. Tí verður hildið at 6% er ein rímilig renting. Av tí at tøkugjaldið er ein útreiðsla í dag, skal hon leggjast afturat, tá samlaða tilfeingisrentan verður roknað.

Talva 1: Samlaðir roknskapir hjá alivinnu á sjónum í Føroyum og útrokning av tilfeingisrentu

mió. kr.	2015	2016	2017	2018	2019	2020	2021	2022
Umsetningur	2.479	3.406	3.384	2.983	3.472	2.859	3.523	4.687
Rakstrar kostnaðir	1.655	1.854	1.874	1.730	1.962	1.983	2.279	2.515
Starvsfólkakostnaðir	179	188	222	229	266	276	346	326
Avskrivingar	103	119	154	182	263	296	368	383
Fíggjarkostnaðir	-39	-38	-18	-10	-9	-19	-19	-38
1 Úrslit áðrenn óvanligt og skatt	503	1.207	1.115	832	972	285	511	1.425
2 Staðfest tøkugjøld	12	161	158	136	140	82	196	284
3 Materiel støðisogn	1.260	1.583	2.305	2.773	3.143	3.339	3.794	4.341
4 Útrokning av 6% av 3 (normal avkast)	76	95	138	166	189	200	228	260
5 Tilfeingisrenta (1+ 2 – 4)	440	1.273	1.135	802	923	166	479	1.449
6 Tøkugjøld (2) í % av tilfeingisrentu (5)	3%	13%	14%	17%	15%	49%	41%	20%

Kelda: Hagstovan og egnar útrokningar[1]


Samlað sæst, at útroknaða tilfeingisrentan sveiggjar nógv og hevur ligið á umleið einari milliard síðan 2016 um sæð verður burtur frá korona árunum 2020 og 2021. Vit síggja, at tað hevur ikki eydnast at fáa tilfeingisrentuna inn í serliga stóran mun tey seinastu árini við tøkugjaldi, tó varð størri partur av henni tikin inn árini 2020-2021. Sjálvsagt er stórar óvissur í hesari útrokning.

Núverandi uppskot

Tað, sum landsstýrið við hesum lógaruppskotið ger, er, at tey vilja áseta eitt 'rímiligt' gjald og kalla tað fyri tøkugjaldið. Hetta gjald fer nú niður í mun til tað tað hevur verið, men tað er eitt sindur ringt at vita, júst hvørja ávirkan komandi eyka partafelagsskatturin fer at hava, tí tað stendur ikki nærri útgreinað, hvussu tann skatturin fer at verða ásettur. Niðanfyri er ein roynd at seta upp í eini mynd núverandi uppskot í mun til tað, sum var galdandi áðrenn hetta og tað, sum var galdandi fram til august 2023. Vit síggja, at uppskotið, sum nú er galdandi tók meira inn um prísirnir eru høgir, í mun til lógina áðrenn. Hinvegin misti tú inntøku tá prísurin var lágur. Í núverandi uppskotið missur tú bara har prísirnir eru lágir, men tú tekur ikki meira inn tá prísirnir eru høgir (her manglar so eyka partafelagsskatturin, sum ikki er so lættur at tekna inn í hesa myndina).

[1] Roknskapartølini fyri árini 2017-2019 fyri aling á sjónum liggja ikki longur á heimasíðuni hjá Hagstovuni, men hava ligið har fyrr. Og kunnu flestu tølini eisini finnast við at fara inn á vinnuvitan.biz og leggja saman roknskapirnar fyri alifeløgini.

Mynd 1: Yvirlit yvir tøkugjaldstigan frá 2019 og til hetta uppskotið, sum kemur í gildið 1. januar 2025



Sostatt verður progressiviteturin í tøkugjaldinum nú avtikin. Tá laksaprísurin veksur, so økist virði á aliloyvinum, og tí eigur landið at fáa meira tá prísurin er høgur. Ein orsøk til at strika progressivitetin sigur landsstýrið vera, at núverandi gjald stýrir atferðini hjá alifyritøkunum tá tær skulu ger langtíðar sáttmálar. Men hetta eigur landið als ikki at taka atlit til. Landið eigur at taka røttu leiguna fyri firðirnar og tað hevur einki samband við, um tað kann loysa seg at framleiða portiónir ella ei.


Trupulleikar við verandi uppskotið

Uppskotið er sum heild rættiliga fløkjasligt skilt á tann hátt, at tað er rættiliga ringt at vita, hvat feløgini koma at gjalda í tøkugjaldið, tí tað avhongur av, hvat prísirnir eru á heimsmarknaðinum og hvat framleiðslukostnaðurin er. Hann skal nú bert uppgevast triðja hvørt ár og tey millum liggjandi árini skal hann roknast út. Hetta fer at hava trupulleikar við sær, bæði fyri feløgini og fyri landskassan. Landskassin kann ikki vita, hvat hann fær inn í tøkugjøldum og feløgini kunnu heldur ikki vita, hvat tey skulu gjalda. Eisini hevur verið ført fram, at hesin skatturin er 'degressivur', soleiðis at feløgini fara at gjalda stóran prosent part tá yvirskotið er lítið og minni tá yvirskotið er stórt. Hetta kann heldur ikki verða rætt.

Ein annar veikleiki við uppskotinum er, at tá prísirnir verða útroknaður verða prísirnir, sum eru á altjóða marknaðinum, nýttir, men tá kostprísirnir verður

útroknaðir, er prísirnir hjá fyritøkunum sjálvum. Hví verður ikki eisini altjóða prísir nýttir her? Her er ein mynd frá Kontali á aliráðstevnuni í ár, sum hevur ein kostnað fyri norsku alivinnuna. Norsku kostnaðirnir eru sambært hesum umleið 58 NOK/kg ella 38 DKK/kg.

Mynd 2: Prísir og kostnaðir fyri aling í Noregi sambært Kontali



Er hetta kannað um tað ber til at nýta kostnaðir hjá norskum alarum (ella onkur altjóða samanberiligur kostprísur) eins og vit nýta norskar prísir fyri laksin?

Alternativ uppskot

Eitt betri uppskot er at hugt beinleiðis eftir, hvat tað er vit vilja leggja avgjald á og so leggja avgjald á tað. Tað, sum er avmarkaða tilfeingi, eru firðirnir. Framleiðslu faktorarnir omanfyri, kapitalurin og arbeiðsmegin, fáa sítt marknaðargrundaða avkast, hví skal fjørðurin ikki eisini hava tað? Ella rættari eigarin av firðinum, sum er Føroya fólk. Hetta hevði verið ein skipan, sum varð at líkna við um tú seldi hesi loyvini at ala á uppboðssølu ella á annan hátt bjóðaði tey út.

Tað tú skuldi ásett var, hvat hvør fjørður er verdur og eitt leigugjald júst fyri at sleppa at ala á hesum firði, tí allir firðir eru ymiskir í dygd til júst laksaaling. Tí skal eitt greiningar arbeiði gerast um, hvat teir ymisku firðirnir eru verdir. Tann fjørður, sum er betri, eigur tú at rinda eina hægri leigu enn fyri tann, sum er verri. Fyri at taka hædd fyri at umsetningurin sveiggjar skuldi tað umframt leigugjald verið eitt umsetningsgjald á part av umsetninginum, men har verður ikki tikið hædd fyri, hvat kostnaðurin er.

Fyrimunurin við hesi skipan er, at tú tekur gjald fyri avmarkaða tilfeingi (firðirnir) og eingin orsøk er til at hyggja at roknskapunum hjá alifyritøkunum. Fyritøkurnar vita, hvat tað er fyri gjald, sum gjaldast skal og kunnu leggja teirra


virksemi til rættis eftir tí. Eisini kann tað almenna í nógv størri mun vita, hvat kemur inn í landskassan eftir hesi skipanini.

Ein onnur loysn, sum hevur verið nevnd, er bert at áseta ein eyka partafelags skatt til alivinnufyritøkur. Men um tað almenna bert ásetur ein eyka yvirskotsskatt, fara fyritøkur innan aling at hava eina áeggjan til ikki at fráboða eitt veruligt yvirskot til tað almenna, tí verður í Noregi brúktir sokallaðir 'norm-prísir', har prísirnir verða ásettir útfrá altjóða marknaðinum. Men eisini er neyðugt at hyggja at 'norm-kostnaðum'. Serliga tí at fyritøkurnar innan alivinnu eru vertikal integreraðar, og harvið eigur sama fyritøka oftani bæði fóðurverksmiðjuna og søluliðið. Hetta krevur tí eitt neyvt eftirlit og neyðugt er at geva TAKS nóg góða heimild, so tey fáa allar neyðugar upplýsingar frá alifeløgunum.

Í Noregi hava tey sum sagt roynt hendan leistin, og var ein skattanevnd sett til at finna útav, hvussu stórur hesin eyka skatturin í Noregi skuldi vera. Hendan nevndin kom til, at hann skuldi ásetast til 60% omaná partafelagsskattin. Síðan legði stjórnin eina ætlan um at eyka skatturin skuldi ásetast til 40% omaná partafelagsskattin, men so tá lógin var komin ígjøgnum Stórtingið endaði tað við at eyka skatturin var ásettur til 25% omaná núverandi partafelagsskattin. Hvat skuldi tann eyka partafelagsskatturin verið í Føroyum?

Eitt sum talan fyri at okkara eyka partafelagsskattur átti at verða ásettur hægri enn tann norski, er at umstøðurnar at ala laks í Føroyum eru serstakliga góðar. Søluprísirnir á føroyskum laksi, hevur seinastu nógvu árini verið umleið 7-8 kr/kg hægri enn laksur frá øðrum londum. Myndin niðanfyri frá Kontali frá aliráðstevnuni í 2022, vísir at EBIT (te. yvirskot áðrenn rentur og skatt) per kilo laks í Føroyum er væl omanfyri øll hini londini, sum ala laks, eisini Noreg.

Mynd 3 Úrslit áðrenn skatt pr. kg av laksi í ymiskum londum




Hetta talar fyri, at um vit ásettu ein partafelagsskatt, skuldi hann verði ásettur omanfyri tað norska støði. Ringt er at vita júst, hvat støðið á eyka partafelagsskattinum verður við núverandi uppskotið hjá Landsstýrinum, tí tað er bæði eitt tøkugjald og seinni kemur ein eyka skattur á 8%, men tað er neyvan líka høgt, sum norska skattanevndin vildi hava tað at verða.

Niðurstøða

Samanumtikið eru nógvir spurningar eftir at verða svaraði í hesum lógaruppskotið. Avleiðingarnar eru sera ringar at útgreina og vita vit ikki, hvat fer at koma inn við hesi skipanini komandi árini, men neyvan verður tað tilfeingisrentan. Serliga tá hugsað verður um at hetta uppskotið skal verða galdandi í nógv ár fram, er tað tí neyðugt at gera eitt størri greiningararbeiði til tess at finna tí røttu skipanina fyri at fáa eitt leigugjald inn fyri føroysku firðirnar.

Hoyringarskriv frá Zvonko Mrdalo, adjunkti:

1. Production costs (Framleiðslukostnaður)
As it stands production costs calculations are supposed to include accounting depreciation. During the last decade, the Faroese salmon industry has been investing heavily in landbased hatcheries along with other capital investments. The chart below shows the mismatch between the real capital investment (CF) and depreciation costs per HoG. The average ratio between those two variables was 2.85 for the analyzed period. Consequently, the overall real production costs will be underestimated.



It is further proposed to attach each company's equal weight to derive an average cost for the industry. The correct way would be to apply each company's production cost given the considerable differences in their production profiles and product ranges (Spot & VAP).

2. Production costs adjustments (Prístalsviðgerð av metta miðal framleiðslukostnaðinum (PK))
The document proposes the usage of CPI from the Faroese statistical agency to adjust the production costs. While such a measure is readily available, the index does not measure changes in production costs. The correct way would be to use (*create*) the **Producer Price Index** by FO Salmon Industry. Secondly, each company's feed costs will be given equal weight, which might not reflect the proper cost structure due to differences in feed origins. A 50% weight seems reasonable given the historical shares for the cost of feed (Iversen *et al.*,2020, https://doi.org/10.1016/j.aquaculture.2020.735089)

3. Resource Fee thresholds
On a positive note, the proposed interaction between operative costs and resource fee thresholds seems to be simplified in comparison to the present regulatory framework (No 75/2023). However, there is a proposed 8% CT addition, although the document does not state how one derives such value. Consequently, one cannot

escape the feeling of a proposed swap between payment channels which might leave the industry's overall payment unchanged.
Nevertheless, there will be an effect on the timing of realized payments to the Treasury/Municipalities. As it stands, based on Table 1 (p.12) simulations, one should expect the first few periods to have lower overall payments due to lagged CT payments, *ceteris paribus*.

4. Financial effects (Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur)
Based on crude calculations from Table 1 (p.12), it has been asserted that due to anticipated lower resource fee payments, the result after tax will be higher. This seems to imply that there is a linear relationship between these two variables which might not be the case in practice. Secondly, there are expectations of higher dividends without *properly* accounting for the additional 8% CT charges (p.13). In practice, there is a positive relationship between companies' dividend payments and **FCF** calculations. Therefore, it remains to be seen how will proposed fiscal changes affect those calculations in years to come.

5. Duration - 2032
The document points to the benefits of the long-term duration (till 2032) of proposed fiscal charges and yet leaves room for changes in case of unforeseen circumstances (p.7). This is too broad a statement that might not assure the industry of the integrity of the proposed regulation, although it will be difficult to define " óvæntað" for both parties involved.